# Umhvørvis aktivisturin Gore




*Al Gore var ein hin fyrsti politikarin, sum hugsaði um umhvørvið. Longu seinast í 70-unum skipaði hann fyri kongresshoyring um evnið*

**Eftir at Al Gore tapti forsetavalið í 2000 móti George W. Bush, hevur hann vígt lív sítt sum verji av umhvørvinum. Vit lýsa lívsleið hjá manninum, sum vitjar okkum í dag í sambandi við Trans Atlantic Climate Conference**

VITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Albert Arnold Gore, Jr. er føddur 31. mars 1948 í Washington DC. Pápin, Albert Gore Sr., var limur í umboðsmannaráðnum umboðandi statin Tennessee frá 1939 til 1944 og aftur frá 1945 til 1953. Hann sat síðani í senatinum frá 1953 til 1971.

Mamman, Pauline LaFon Gore, var ein hin fyrsta kvinnan, sum fekk prógv frá Vanderbilt University Law School.

Barna- og ungdómsárini vórðu býtt millum Washington DC og lítla býin Carthage í Tennessee, har hann um sumrarnar arbeiddi á familjugarðinum, har tey hava hoyggj, dyrka tubbakk og hava neytahald.

Hann átti eina eldri systir, Nancy Gore Hunger, sum tó doyði av lungakrabba í 1984.

Skúlaárini gekk hann í St. Albans School í Washington DC, og læs seinni á Harvard University, har hann tók B.A. í stjórnarfrøði (cum laude) í juni 1969.

Í 1970 giftist Gore við Mary Elizabeth Aitcheson (nevnd Tipper). Tey eiga fýra børn, Karenna (fødd 1973), Kristin (1977), Sarah (1979) og Albert III (1982). Abbabørnini eru tvey, Wyatt Gore Schiff (1999) og Anna Hunger Schiff (2001).

Sum so nógvir aðrir amerikanarar fór Al Gore eisini inn í herin, hóast hann var ímóti Vietnamkrígnum. Hann kundi annars sloppið undan, tí ein familjuvinir hevði goymt honum pláss í the National Guard. Men pliktkenslan gjørdi, at hann meldaði seg í herin 7. august 1969.

Eftir grundvenjing í Fort Dix, varð Gore settur sum blaðmaður á The Army Flier, hernaðarblaðið á Fort Rucker. Tá sjey mánaðir vóru eftir av hernaðartíðini varð Al Gore sendur til Vietnam. Hetta var 2. januar 1971, og hann var í tænastu hjá 20th Engineer Brigade í Bien Hoa.

Heimsendur frá Vietnam fór Gore at lesa journalistik og teologi á Vanderbilt University. Samstundis arbeiddi hann á blaðnum The Tennesseean í Nashville á náttarvaktini. Seinni arbeiddi hann fast á blaðnum í fimm ár sum blaðmaður, har hann kannaði korruptión millum limir av Metro Council í Nashville. Hetta førdi til handtøku og dóm av tveimum embætismonnum fyri ymisk lógarbrot.

Eftir at hava fullført eitt ár av Rockefeller Foundation Scholarship, gavst hann at lesa teologi og kastaði seg fulla tíð yvir journalistikkin. Nøkur ár seinni, frá 1974-76 læs hann jura á Vanderbilt, til hann knappliga setti sær fyri at stilla upp til umboðsmannaráðið í 1976.

## Politisk lívsleið

Seint í februar 1976 boðaði Joe L. Evins óvæntað frá, at hann gavst í politikki og tók ikki við afturvali. Evins hevði annars loyst Albert Gore Sr. av sum umboðsmannaráðslimur í 1953, og tá Gore Jr. frætti hetta, gjørdi hann av at taka seg úr juralesnaðinum og stilla upp til valið.

Hetta kom óvæst á sjálvt hann sjálvan, og konan, Tipper Gore, stóð púra býtt, tá hon fekk tað at vita.

Gore vann tepurt demokratiska valið og stillaði tí upp við ongum mótvalevni og varð tískil valdur í sín fyrsta tingsess 28 ára gamal.

Al Gore varð afturvaldur tríggjar ferðir, í 1978, 80 og 82. Í 1984 stillaði hann upp til senatið, ein sess sum republikanski meirilutaleiðarin Howard Baker hevði havt. Hetta valið vann Gore. Hann sat sum senator umboðandi Tennessee fram til 1993, tá hann gjørdist varaforseti.

Sum senator sat hann í eini røð av nevndum so sum Senate Armed Services, House of Intelligence, Commerce, Science and Transportation, Rules and Administration og Governmental Affairs.

19. mars 1979 gjørdist Al Gore hin fyrsti á C-SPAN (ein kaðalrás, sum sendir non-stop frá stjórnarfundum og tingfundum), tá hann helt røðu í umboðsmannaráðnum. Og seinast í 80-unum setti Al Gore fram the Gore Bill, sum seinni varð samtykt sum High Performance Computing and Communication Act of 1991. Leonard Kleinrock, sum var ein av høvuðsmonnunum aftan ARPANET, metir lógina ein mílastein í internetsøguni.

Gore gjørdi støðu sína greiða um Golf kríggið, serliga áðrenn og aftaná. Í einari røðu sum senatorur í 1992 gjørdi hann vart við, at hann sum senatorur tvær ferðir royndi at steðga amerikanska stuðlinum til Saddam Hussein, men fyrst Reagan- og síðani Bush-stjórnin høvdu forðað hesum. Í kjalarvørrinum av Al-Antal herferðini, har Hussein framdi deyðilig álop á irakiskar kurdar við sinnops- og nervagassi, setti Gore fram Prevention of Genocide Act of 1988, sum hevði skorið burtur allan stuðul til Irak. Hetta uppskotið fall tó.

## Forsetaval

Al Gore stillaði upp fyrstu ferð til forsetaforvalið hjá demokratunum í 1988. Arg-